## Klumman



**Jákup Mørk**
blaðmaður
jakup@sosialurin.fo

# Vilja vit visjónina

Higartil hava nógvir klókir og vísir menn tosa um føgru ætlanirnar um visjón 2015. Við einum undantaki tykjast hesir tó allir hava gloymt, hvør týdningarmesti parturin av eini broytingarætlan er. Nevnliga trúgvin hjá einum heilum samfelag uppá, at hetta er rætta leiðin at ganga.

Í vinnulívinum er tað ein klassiskur feilur, at stjórin ofta gloymir at fáa starvsfólk við í eini broytingarætlan. Hetta tí stjórin longu í rúma tíð hevur arbeitt við hesum, og tí er vorðin sannførdur um, hvør rætta leiðin er. Og júst tað sama tykist eisini gera seg galdandi hjá landsins leiðslu og tess embætisverki.

Har verður tosað um, hvørjir lutir skulu broytast. Niður í smálutir verður tosað um, hvussu hetta skal gerast. Men boðskapurin um hví vit gera hetta, og hvør fær ágóðan, tykist vera gloymdur. Jú – visjón 2015 fær ágóðan. Tú veit, tá Føroyar verða heimsins besta land. Tað í sjálvum sær eru vit neyvan ósamd um. Men tað er kanska eitt dekan ov víðskygt mál at seta sær, um vit ikki eisini síggja og merkja batar onkra staðni á leiðini.

»Kann eg velja millum sannføring og ótta, so velji eg altíð óttan. Sannføringin kann broytast« Soleiðis tók Stalin til á sinni. Og oftani tykist hetta eisini vera høvuðssetningurin hjá landsins kosnu. Tí fyri tað mesta verður bara tosað um ræðumyndir, um vit ikki fylgja altjóðagerðini. Um vit ikki fremja visjón 2015-broytingarnar, gongur so og so galið.

Hví ikki lata øll tey, sum ikki eru partur av samgongu- og embætisverkinum, fáa sína egnu orsøk til at lata seg sannføra um, at hetta er rætta leiðin at ganga?

umborð

# - Hetta er heilt genialt

**Síðan apríl hevur Heini Joensen siglt við Norrønu, og hann hevur alt gott at bera sínum starvsfeløgum í barrunum, sum í stóran mun eru pól-lendingar. – Tey eru øll fitt, blíð og ógvuliga dugnalig, sigur hann**

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo



*- Hetta verður mín seinasti túrur umborð á Norrønu á hesum sinni. Eg fari nú í starv sum handilsleiðari hjá Demich. Tað er við sorgblídni, eg sigi manningini farvæl, sigur Heini Joensen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Hetta dámar mær ógvuliga væl. Tað er fantastiska stuttligt og áhugavert at arbeiða umborð á Norrønu. Hóast fólk úr nógvum ymiskum tjóðum arbeiða í tænastuni umborð, er stemningurin góður. Vit skulu øll samstarva. Hetta gongur væl, og vit læra nógv av hvørjum øðrum.

Tað sigur 26 ára gamli, Heini Joensen, sum er ættaður av Nesi.

Vit hittu hann í Naust-barrini umborð á Norrønu mánakvøldið, har hann stóð aftanfyri diskin og fylti upp í gløs til ferðandi, sum høvdu hug at leska sær við onkrum í góðveðrinum hetta kvøldið.

Men Heini var ikki leingi í hesi barrini. Lutfalsliga fá fólk sótu kring um við borðini, men í Viking Club á dekkinum niðanfyri var dansur og meira at gera hetta kvøldið.

- Eg fari niður í hina barrina nú at hjálpa til. Kom bara niður hagar, so kunnu vit práta meira.

Tænastufólkið umborð á Norrønu er rættiliga fleksibult, og tey hjálpast at, tá á stendur.

- Vit hava tvær størri barrir og ein minibarr, har tú kanst keypa "kyllingar" og ís, sigur Heini.

Ungi nesdrongurin er annars útbúgvin krambakallur í Havnar Timburhandli, har hann lærdi og í nøkur ár starvaðist sum innkeypsleiðari.

- Vanliga er meira at gera í barrini niðri undir. Vit eru hálvt annað fólk og meira uppi á – og eini 2-3 niðri undir. Annars liggur talið av fólki, sum starvast í barrunum og resturantunum, millum 6 og 10 – alt eftir, hvussu nógv fólk er við Norrønu, sigur hann.

Vanliga arbeiðstíðin umborð er 10 tímar um døgnið, men er nógv at gera, verður arbeitt yvir.

- Eg vil siga, at vit javnan arbeiða millum 10 og 13 tímar um døgnið, og tað haldi eg vera í fínasta lagi.

Hann sigur, at tey antin kunnu fáa yvirtíðina útgoldnað í peningi ella í avspasering.

- Eg arbeiði mest aftanfyri diskin sum barrfólk og ikki so nógv úti á gólvinum sum barrtænari. Men stendur á, hjálpast vit at.

Heini hevur alt gott at bera sínum starvsfeløgum í barrunum, sum í stóran mun eru póllendingar.

– Barrleiðarin, sum er sera dugnaligur, er eisini póllendingur. Tey eru øll fitt, blíð og røsk. Tað er ikki minst teir mongu nationalitetirnir, sum mær dámar væl. Hetta er simpulthen genialt, sum hann tekur til.

Tey, sum sigla við Norrønu, eru vanliga fýra vikur umborð og fýra vikur heima. Tey eru limir í sjómannadeildini hjá Føroya Fiskimannafelag, og lønin er sambært farmaskipasáttmálanum.

Lønin er 15.611 krónur um mánaðin fyri arbeiðstíðina, sum er ásett í sáttmálanum.

Vit spurdu eisini Heina, hvussu er við upplæring.

- Í fyrsta lagi er neyðugt at hava verið á trygdarskeiði, tí trygdin umborð verður altíð sett í hásæti. Sjálv upplæringin til barrtænastuna fer fram í samstarvi við barrleiðara og tey, sum hava royndir og kunnu læra frá sær. Fleiri av tænastufólkunum hava drúgvar royndir innan hetta virksemi, og tey eru ófør at læra frá sær.

Hann sigur, at eitt er sjálv tænastan. Annað er søgan aftanfyri tey ting, tú arbeiðir við, eitt nú gløs og annað.

- Í slíkum arbeiði fært tú eina holla vitan um hetta økið.

Men hóast honum dámar sera væl umborð á Norrønu, verður Heini ikki verandi leingi aftrat við skipinum.

- Hetta verður seinasti túrurin hjá mær, og annan mánadag byrji eg í starvi sum handilsleiðari hjá Demich. Eg fari við sorgblídni, tí hetta hevur verið eitt rættiligt upplivilsi, sigur nesdrongurin.

Heini Joensen hevur ikki verið nógv á sjónum.

Og tó.

Hann var nakrar túrar við línuskipinum Stapanum fyri eini 4-5 árum síðan.

- Mær dámdi eisini væl umborð á línubáti, men lívið har umborð – og lívið umborð á Norrønu – kann als ikki samanberast. Tað er púrasta hvør sítt, leggur hann aftrat.

Í frítíðini umborð á Norrønu stytta tey sær stundir við eitt nú práti, hyggja at filmi, svimja og sita í sauna, tá tað ber til.

- Vit kunnu bert undir serligum umstøðum og við loyvi vera ímillum vanliga ferðafólkið í okkara frítíð. Hetta er bert, um onkur í familjuni er við ella onkur av okkara nærmastu kenningum. Tað samskifti, vit hava við ferðafólk, er í okkara arbeiði, sigur Heini Joensen.